**Tit ringja — vit skriva**
Ein spurningur, alla tíðindi, so ring til okkara
Telefon 118 20 · Telefax 147 20

tíðindablaðið **sosialurin**

**Lýsingar**
Telefon 118 20 · Telefax 147 20

## veðrið

Eitt hátrýst, meira enn 1030 hpa, yvir norðara parti av Norðsjónum gongur spakuliga í ein eystan. Eitt lágtrýst, 1005 hpa, yvir Eysturlandinum, grynnist, og eitt annað lágtrýst sunnanfyri Ísland gongur eystureftir. Tilhoyrandi brúgvaløg við kaldari luft reka yvir Føroyum av norði. Sunnudagin mennist hátrýstryggurin yvir Føroyum og flytur seg móti Vesturnoregi. Brúgvaløg reka yvir Føroyum vestaneftir fyrst í næstu viku.

**Leygardagin**



Ælaveður, seinni sum kavaæl ella kavi, men eisini sær sólin. Frískur vindur av útnyrðingi til landnyrðing, 8–13 m/s, minkandi út á dagin niður í 3–8 m/s. Hitin um frostmarkið.

**Sunnudagin**
Samdrigið og fyri tað mesta turt. Lot undir 5 m/sek, og hitin millum frostmarkið og fimm hitastig.

**Mánadagin & týsdagin**
Skýggjað og turt. Týsdagin av vestri. Landsynningur, 3–8 m/sek, týsdagin veksur hann vindin til frískan ella hvassan vind, 10–15 m/sek. Hitin 5–8 stig.

## óli teknar

© 1994 Sosialurin/Óli Petersen

*Oljumarra*



Ymiskt er sum oljuframleiðaralondini fáa burturúr

# Tingfólk hava hølistrupulleikar

*Tingfólk hava vánaligar og trongligar arbeiðsumstøður. Tað hevur ikki bøtt um, nú fleiri flokkar skuldu hava innivist, sigur Marita Petersen, tingformaður*

Formansskapurin á tingi hevur m.a. um hendi at skaffa tingfólki arbeiðshølir. Á fundinum hósdagin vóru eisini hølisviðurskiftini hjá tingfólki og løgtingsskrivstovuni viðgjørd.

- Arbeiðsumstøðurnar eru ikki góðar, og tað er ikki vorðið lættari at skaffa tingfólki innivist, nú tveir flokkar eru komnir aftrat, sigur Marita Petersen.

-Tað hevur tó eydnast at útvega øllum flokkum arbeiðshøli, men nógv hava ógvuliga trongligar umstøður.

- Løgtingsskrivstovan er heldur ikki væl fyri, hvat arbeiðshølum viðvíkur, og gamla Apotek er samanumtikið ikki hóskiligt til endamálið.

Vit kunnu tó ikki vænta, at nýtt tinghús verður bygt fyribils, og tí hevur formansskapurin sett sær fyri at kanna húsaspurningin.

- Treytin er tó, at arbeiðshølini hjá flokkunum ikki verða ov spjædd hvør frá øðrum, eins og tað heldur ikki skal vera ov lagt frá tinghúsunum. Vit vóna, at ein loysn verður funnin á húsaspurninginum um ikki so langa tíð, sigur Marita Petersen, tingformaður.

Dagny

**Storno**

900 MHZ
vigar bert 235 gr.
**Storno**
Handan Á 6 - Tórshavn
Tlf. 14414 - Fax. 18045

**BLÁDÝPI**
bjóðar einstaklingum og bólkum gott og bíligt innivist
- á sumri og á vetri!
Dr. Jakobsensgøta 14-16
Tel: 11951 Fax: 19451

**PHILIPS 100 Hz**
Heimsins bestu sjónvørp - við myndini, ið als ikki ristir
DISCOUNT
**marstein**
Áarvegur - Tlf. 11300 - 11305

## Vestfalskyrrindi

11. oktober: Fyrra kvarter
19. oktober: Fullmáni
22. oktober: Mánin longst frá jørðini

| Dato | Suðuroyar-/Vágafirði | | Vestmannasundi | | Nólsoyarfirði | | Haraldssund/Leirvíksfirði | | Skúvoyarfirði/Skopunarfirði | | Hestfirði/Sandalagnum | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. |
| 15. okt. | 0318 | 1539 | 0518 | 1739 | 0133 | 1354 | 0333 | 1554 | 0218 | 1439 | 0233 | 1454 |
| 16. okt. | 0400 | 1621 | 0600 | 1821 | 0215 | 1436 | 0415 | 1636 | 0300 | 1521 | 0315 | 1536 |
| 17. okt. | 0443 | 1704 | 0643 | 1904 | 0258 | 1519 | 0458 | 1719 | 0343 | 1604 | 0358 | 1619 |
| 18. okt. | 0525 | 1746 | 0725 | 1946 | 0340 | 1601 | 0540 | 1801 | 0425 | 1646 | 0440 | 1701 |